# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Festivaltíð

Tað er nú aftur festivaltíð. Við summarinum koma eisini tónleikafestivalarnir. Tann fyrsti fer at bakkastokki nú komandi vikuskifti, tá Skálabotnur er miðdepil fyri Fjarðafestivalinum. Hetta er tann 4. festivalurin, sum verður hildin í Kelduni í Skálabotni.

Og eftir henda ársins fyrsta festival koma allir hinir slag í slag. Nógvir av festivalunum eru vornir fastur táttur í summarmyndini, eitt nú Jóansøkufestivalurin, Asfalt, G!Festivalurin og Summarfestivalurin. Onkur nýggjur festivalur sær eisini dagsins ljós í summar. Tað er tann Við Múrin í Kirkjubø, sum stórur spenningur er um. Hann verður hildin í einum sera vøkrum og søguligum umhvørvi, og vit ivast ikki í, at hann eisini fer at gerast fastur festivalur á hvørjum ári. Aftrat hesum kann eisini nevnast Barnafestivalurin, sum Tórshavnar Kommuna skipar fyri í sambandi við 100 ára haldi. Og so ikki at gloyma Ólavsøkukonsertina, sum eisini má sigast at vera eitt slag av festivali.

Festivalar koma og fara. Soleiðis vil tað altíð vera. Onkur teirra er longu farin í søguna, men so koma bráddliga aðrir. Her er Við Múrin feskasta dømi um ein nýggjan festival, sum tíðin so fer at vísa, um hann verður afturvendandi. Vit ynskja honum góða eydnu.

Eitt er givið, at tað er fyrst og fremst veðrið, sum drívur verkið. Uttan sól og summar er ofta lítið veiggj í festivalunum, tí umframt tónleikin eru teir eisini eitt sosialt savningarstað fyri ung og tilkomin. Á festivalunum hoyrir tú ikki bert góðan føroyskan og útlendskan tónleik, tú hitti eisini vinir og kenningar, og onkur finnur entá sín framtíðar maka.

Tað vilja altíð vera tey, sum síggja fleiri av festivalunum einans sum eitt høvi til at njóta rúsdrekka, og tað ringa, sum kann standast av tí. Sjálvandi hoyrir eisini rúsandi løgur, her serstakliga øl til nógvar av festivalunum, men royndirnar hava víst, at tey ungu duga sær hógv, og har strangt eftirlit er, har gerast mangir av festivalunum eisini til tónleika- og sosialar løtur, har gleðin er í hásæti. Gleðin við at hoyra góðan tónleik, gleðin við at vera saman við øðrum og at hitta vinir og kenningar. Gleðin við at vera úti í náttúruni.

Miðlahúsið fer at fylgja festivalunum og geva sítt íkast til, at festivalarnir fara at eydnast væl og gleða sum flest føroyingar. Eitt nú fer Rás2 hvønn týsdag at umrøða teir ymsu festivalarnar og lagt varð fyri í morgun við Fjarðafestivalinum.

Vit fara við hesum at ynskja tykkum øllum, sum hava átikið stóru uppgávuna at skipa fyri festivalunum í summar, góða eydnu. Og Føroya fólki fara vit at ynskja eina góða festivaltíð komandi vikurnar.

**Sosialurin**

## Politikkur søkist

**KÁRI Á RÓGVI**
løgtingsmaður



Samgongan, ið samtykti fyri hundraðtals milliónir í íløgum, teirra millum tvey sett av paralellum tunnlum, hevur boðað frá sparingum, ið tó enn vilja vera ónevndar.

Síðstu tíðina havi eg hitt veljarar, ið hava frætt, at mvg'ið skal hækkast, at lønarvøkstur skal strikast, at rentustuðul til vanlig sethúsalán skal lækkast, at minstuløn skal lækkast, at pensjonistar skulu missa enn meira og so framvegis.

Hvat av hesum verður veruleiki, veit eg ikki at síga teimum, tí nú útreiðsluhækkingarnar eru samtyktar, er um at gera, at tingið ikki má koma saman. Var nakar dugur í, jo so fingu vit munnligar fyrispurningar á skrá og fingu greiðu á, hvørjar plágur skulu regna yvir Føroya fólk í næstum.

**Í hjørtum teirra býr autoritetstrúgv**

Meginandstøðan meldaði út henda dagin ígjøgnum tingbólkaformann sín, at Tjóðveldi sum undantak fer at seta fólkið fyrst og lata floksins endamál víkja. Nú var eg av teirri fatan, at burtursæð frá sp/f Fólkaflokkinum vóru allir flokkar í Føroyum stovnaðir uppá tað felags besta, men eru bert ósamdir og hvat og hvussu. Men Tjóðveldi hevur nú tann politikk, at ger samgongan óproduktivar samferðsluíløgur, ja so skal Tjóðveldi eisini vísa á sínar óproduktivu íløgur, ger samgongan óskipaðar sparingar, jo skal Tjóðveldi eisini vísa á onkran tilvildarligan niðurskurð.

Samstundis hoyra vit, hvussu Føroyar verða stýrdar 'live' í útvarpinum. Rósa Samuelsen, ið loyalt hevur spart eftir boðum frá Jóannesi Eidesgaard, kann fáast til at broyta einhvørja avgerð fyri opnari mikrofon, um bert útvarpið kemur við málinum. Hans Pauli Strøm kunnger, at tá ið hinir landsstýrismenninir tilsamans hava yvirtrekt meira enn hann, so gongur hann fríur! Sjálvt um politikarar altíð hava sagt "hoppa og renn!" við veljaran, so hevur Hans Pauli í hesum døgum lyft tað upp í heilt nýggjan potens. Hvørki fíggjarmálaráðharri, løgmaður ella formaður í landsstýrismálanevnd gera nakað við málið – tí stýrisskipanin kann broytast í beinleiðis tíðindasending.

**Far aftast í raðið!**

Í kenda táttinum hjá Tonglatummasi um Johan Nielsen siga teir Marx og Engells: "far aftast í raðið Johan." Vit í andstøðuni fingu í síðstu døgunum áðrenn tingsteðg hesa generøsu innbjóðing: Vit kundu sleppa at seta tær allarniðastu undirskriftinar á rentustuðulslækkanina – eftir at fíggjarnevndin hevur kunngjørt sína loysn fyri rentustuðulin, sum leggur dent á at taka pengar beinanveg frá fólki við vanligum inntøkum og lánum.

Tað var tað. Restina av raðfestingum í bæði debet og kredit, rakstri og íløgum skuldi samgongan taka sær av í sínum einaræði, hvørs ideologiska grundarlag sæst lýst í álitinum í tingmáli 185/2008.

Vóru veruligar samráðingar, so tóku vit fatur uppá bygnaðarliga hallið hjá landinum, løgdu aðalráð saman og stovnar saman, lagaðu sosialar útreiðslur meira eftir tørvi enn eftir skema, strikaðu rakstrarstudningar, strikaðu tollfrían innflutning og onnur undantøk, seldu aftur tey partabrøv, ið vórðu noydd uppá skattgjaldaran á náttartíð, men framumalt góvust við at brúka hundraðtalsmilliónir til íløgur, ið ikki økja um búskaparliga førleikan, samstundis sum vit byrjaðu at gera íløgur í framtíðar førleika við massivum íløgum í gransking og hægri útbúgving.

Men vit verða biðin um at fara aftast í raðið at bíða eftir nøkrum tilvildarligum niðurskurðum.

## Fólkið kann ikki straffast fyri at politikararnir hava sovið í tímanum

**JÓNA MORTENSEN**



Tað er gleðiligt at hoyra/lesa, at nú fer okkurt at henda innan bygging av røktarheimi í Tórshavn. Men er nøkur loysn funnin til øll tey, sum hava hjálp fyri neyðini beint nú? Tað hoyra vit einki um. Herfyri var ein kvinna í sjónvarpinum og greiddi frá, at omma hennara, sum hevði búð á Landsjúkrahúsinum í fleiri mánaðir, skuldi flytast til Klaksvíkar, tí einki røktarheimspláss var í Tórshavn. Kvinnan var sjálvandi kedd og føldi, at omman fekk eina ósømilga viðferð. Tað er ikki einasta dømi, tíverri.

Tá tað snýr seg um ein akkutan bíðilista, sigur tað seg sjálvt, at nakað akutt má gerast. Tá fólk eru so illa fyri, at tey avvarðandi ikki »hætta« sær at hava tey heima, nyttar ikki at játta teimum meira heimahjálp, tá mugu tey sleppa á eitt røktarheim ella okkurt líknandi.

Eg haldi at tað er upp á tíðina at fara at arbeiða við at finna eina loysn her og nú til tey stakkals fólk, sum hava brúk akuttari hjálp. Í einari tíðlíkari støðu kann ein ikki bíða eftir einum røktarheimi, sum ikki er byrjað upp á enn. Tað má verða innan heilt stutta tíð, at nakað hendir, so fólk vita, at støðan sum tey eru í nú, skjótt fær ein enda. Alt annað er í míni verð ómenniskjasligt. Fólkið kann ikki straffast fyri, at politikarnir hava »sovið í tímanum«, tí hettar er ikki ein støða, sum er íkomin eftir einum degi, hettar er komið so líðandi og kundi verið tikið hond um fyri langari tíð síðani.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.